# Dansa nú í takt

*Fyri einum ella tveimum árum síðani stóðst nakað av blaðkjaki av, at tiltøkini Summartónar og Atlantsljómur vóru samstundis og tí líkasum tóku hvør frá øðrum. Nú hava fyrireikararnir kastað saman og í gjár løgdu teir fyrstu ætlanirnar fram*



*Føroysk Tónaskøld skipar fyri Summartónum. Útlendskir vitjandi leika eisini altíð minst eitt føroyskt verk á ferðini*

DAGFINN OLSEN

Tiltakið Summartónar byrjaði fyrst í nítiárunum. Í ár er 9. ferðin, at tiltakið er.

Fyrstu ferð var tiltakið í 4 dagar og ein útlendsk vitjan var á skránni

Nú er tiltakið vorðið meira umfatandi. Verk verða skrivað til Summartónar hvørt ár. Eisini er krav til tey útlendsku vitjandi, at tey hava á skránni eitt føroyskt verk.

Kristan Blak, fyrireikari sigur, at hetta er eingin trupulleiki, tí oftast eru tey fegin og spent uppá at royna at spæla føroysku verkini.

Tað er í dag Føroysk Tónaskøld og Norðurlandahúsið, ið skipa fyri.



*Yaacov Bergman vitjaði í 1998 í Føroyum og stjórnaði Verdis Requiem. Nú vitjar hann aftur til Atlantsljóm og skal hann stjórna Brahms Requiem Mynd: Jens Kristian Vang.*

**Byrja á berum**

Enn er einki fíggjarligt yvirlit yvir tiltakið í ár. Ein trupulleiki, sum fyrireikarar av slíkum tiltøkum hitta hvørt ár, er nevniliga fíggingin. Hvørt tiltak, festivalur, er ein ætlan fyri seg og einki støðugt er at halda seg til. Byrjað verður á berum á hvørjum ári.

Meting sigur, at umleið 1/5 partur verður goldin av landi og kommunum. Restin eru pengar úr hinum norðurlendku londunum. Fyrireikararnir ivast í, hvussu rættvíst hetta er, tí tiltakið er her og kastar av sær hjá okkum,

Mannagongdin er ikki haldbar í áravís, eru fyrireikararnir samdir um.

Norðurlandahúsið stendur fyri tí praktiska og ber kanska 1/3 til 1/2 av kostnaðinnum.

Bæði fyrireikararnir av Atlantsljómi og Summartónum vísa á, at nógv orka fer til at leita eftir peningi og at Føroyar ofta vísa á sína sterku mentan, men er samstundis millum tey lond, í letur minst í mun til íbúgvaratalið til mentan.

**Samstarv**

Ólavur Hátún er millum fyrireikararnar av Atlantsljómi. Summartónar og Atlantsljómur eru enn sum áður hvør sín ætlan, men samstarva nú.

Tá Norðurlandahúsið kom, skipaði Ólavur saman við øðrum fyri sonevndum Tónlakadøgum í Norðurlandahúsinum. Tá var eitt kór úr øllum landinum, nevnt Føroyakórið. Seinni datt heta niðurfyri og síðani spratt hugsanin um Atlantsljóm, sum Havnarkórið fyri mestapartin stendur fyri. Nýtt er, at Atlantsljómur samstarvar við Summartónar soleiðis, at konsertirnar, ið hoyra inn undir Atlantsljóm, eru á samlaðu skránni hjá Summartónum.

Eins og Summartónar leggja seg eftir Brahms í ár, so verður Brahms Requiem á skránni hjá Atlantsljómi.

Í ár vitjar heimskendi dirigenturin Yaacov Bergman aftur. Hann var eisini her fyri tevimum árum síðani og stjórnaði tá ,Verdis Requiem' og vil fegin vitja land okkara aftur, tí Føroyar hugtóku hann.

Luttakarar á Atlantsljómi eru nógvir í tali.
„Brahmskórið", Føroyar 60 fólk (Havnarkórið + aðrir sangarar)
Ginnungagap, Norra ,16fólk
Dania Sonans, Danmark 35fólk. Sandnes Orkesterforening,17fólk
Austrian Art Ensemble 20 fólk. Fø. Tónleikarar, 12 fólk. Solistar, 2 - (Lars T. Bertelsen, DK, Berghild Poulsen, FO). Dirigentur, Yaacov Bergman, USA
íalt 163 luttakarar
føroyingar 72 og útlendingar 91

**Hugnaløtur kring landið**

Norðulandahúsið er við í tiltøkunum.

Helga Hjörvar og Fróði Vestergaard frá Norðurlandahúsinum siga, at í samband við Summartónar á bygd, er ætlanin at skipa fyri hugnaløtum. ikki bert vanligum konsertum, men heildarupplivingum.

Tiltøkini á bygd eru fleiri og tey eru ókeypis.

**Viðurkend fólk**

Nógv fólk eru á luttakaraskránni til bæði Atlantsljóm og Summartónar.

Adubáran verður ikki við sum bólkur í ár, tí tey leggja orkuna í eina útgávu við føroyskum tónleiki. Men fleiri teirra verða við sum einstaklingar.

Håkan Hagegaard er heimskendur, baryton. Tað hevur eydnast at fáa hann hendaveg, tí m.a. Ernst Dalsgarð jú starvast sum operasangari í Danmerk og tí kennir Håkan.

Blásarakvintett Reykjavíkar er eisini sera kend. Um eina viku kemur út fløga, har hon spælir føroyskan tónleik.

Dentur verður lagdur ,á tveir norðurlendskir tónasmiðir til Summartónar í ár. Atli Heimir Sveinsson, Ísland, og Ib Nørholm, Danmark. Hesin seinni hevur verið lærari hjá Sunleif Rasmussen og Tróndi Bogason.

Og so er tað heimskendi Yaccov Bergman, sum á Atlantsljómi stjórnar Brahms Requiem.

# Skrivstovustjóri í Listaskálanum

*Hann er listamaður, sjálvlærdur, og hann fæst við alskins tilfar og ger design og grønlendsk bindimynstur. Hann gjørdi grønlendska flaggið og ger hópin av búmerkjum. Hann er skrivstovustjóri og hevur føroyska konu*

DAGFINN OLSEN

Thue Christiansen er navnið. Hann er skrivstovustjóri í grønlendsku umsitingini, og hann er limur í nevndini fyri Norðurlandahúsið í Føroyum. Men umframt er hann sjálvlærdur listamaður.

Og Thue er sanniliga listamaður, ið fevnir víða. Hann gjørdi grønlendska flaggið. Hann er í heilum við í kappingum um búmerki.

Hann ger skurðmyndir, veggmyndir, standmyndir og gangnlist.

Hann evnar úr horni, rekaviði, jarni, skinni og øðrum.

Grønlendarin Thue Christiansen er eisini grønlendari við hjartanum á rætta stað.

Umframt, at hann designar klæði úr skinni og skræðu til íslendskan skræddara, so hevur hann eisini gjørt grønlendskt bindimynstur, tí hann helt tað vera heldur fjákut, at grønlenskar konur bundu frammand motiv á troyggjurnar.

Eisini í samband við haldið fyri komu Eiriks Reyða til Grønlands hevur nógv verið gjørt burturúr. Thue setti fram spurningin, um einki var til teirra, ið vóru har áðrenn, men so var ikki. Tí framleiddi hann sjálvur minnismerki at koyra á brævbjálvar fyri at gera vart við hetta.

Til mentanarhúsið í Nuuk, Katuaq, ið merkir trummustavur, hevur Thue gjørt talarastólin. Hetta er sera snøggur stólur úr skinni, reinsdjórahorni og hvalatonn, ið ímyndar stavnin á grønlendska konubátinum.



*Thue vísir pinkumynd av talarastólinum í Katuaq. Hann hevur í talarastólinum myndað stavnin á grønlendska konubátinum. Thue letur í dag upp framsýning í Listaskálanum. Mynd: Jens Kristan Vang*

Thue hevur føroyska konu. Mamma hennara er úr Havn og pápin úr Aalborg.

- Sostatt eru børn okkara úr øllum ríkinum, skemtar Thue.

Hann hevur eisini roynt at búð í Havn og hann skilir tað mesta av tí, sum stendur at lesa í føroysku bløðunum. Men tá føroyingar práta skjótt sínamillum, er verri at skilja.

Í dag klokkan 16 letur Thue Christiansen upp listaframsýning í Listaskálanum í Havn.



# Klaksvíkin og Havnin siga nei

*Landsbankin hevur saman við danska Unibank arbeitt við eini møguligari umlegging av føroysku kommunuskuldini, men stendur tað til býráðsformannin í Havn og Klaksvíkar býráð, verður henda ætlanin av ongum*



*Sigurd Poulsen, landsbankastjóri, vil fegin hava eina loysn, har kommunurnar í felag umfíggja lán síni*

JÁKUP MØRK

Í farnu viku vóru umboð fyri danska peningastovnin, Unibank, í Føroyum, í sambandi við eini møguligari endurfígging av føroysku kommunuskuldini.

**Umfíggja við lánsbrøvum**

Saman við Landsbankanum hevur danski peningastovnurin seinastu tíðina arbeitt við einum uppskoti, sum hevur til endamáls at umfíggja føroysku kommunuskuldina.

Talan er um, at eitt nýstovnað felag skal selja lánsbrøv, soleiðis at neyðugi peningurin til endamálið fæst til vega.

Sigurd Poulsen, landsbankastjóri, vildi ikki gera nakrar serliga viðmerkingar til ætlanina, men hann váttaði tó fyri Sosialinum, at teir í løtuni arbeiða við hesum. Víðari segði hann, at ein møgulig endurfígging, ella umlegging, krevur, at føroysku kommunurnar sýna neyðugt samhaldsfesti, soleiðis, at eisini tær kommunur, sum ikki eru so øgiliga skuldartyngdar, eru við í hesum.

Hetta merkir somuleiðis, at tað hevur avgerandi týdning, at Tórshavnar Kommuna er við, soleiðis at samlaðu upphæddirnar, sum skulu fíggjast, gerast nóg stórar. Júst hvussu stóra upphædd talan er um, kundi Sigurd Poulsen ikki siga, tí hetta hongur saman við, hvussu nógvar kommunur taka undir við ætlanini.

**Ivasamt við Havnini**

Leivur Hansen, borgarstjóri í Havn sigur við Sosialin, at býráðið enn ikki hevur tikið støðu til málið, men at fyrsta viðgerð av hesum verður á býráðsfundi í kvøld.

Upp á spurningin um Leivur metti, at býráðið var positivt sinnað fyri uppskotinum, svaraði borgarstjórin, at hann sum so einki fekk sagt um hetta, tí málið hevði enn ikki verið til viðgerðar.

Sjálvur helt Leivur tó, at eftir hansara tykki var tað rættuliga ivasamt, um størsta kommunan í landinum, enn eina ferð fór við í eina loysn saman við restini av landinum.

Samstundis vísti hann á, at Havnin ikki hevði fyri neyðini at vera við, tá kommunuavtalan varð undirskrivað á heysti 1995, men at teir kortini gjørdist partur av ætlanini, til tess at føroysku kommunurnar í felag kundu hjálpast úr kreppuni.

Harumframt legði hann afturat, at teir eisini hava sýnt solidaritet, nú Landsstýrið í løtuni arbeiðir við eini loysn, har ringast støddu kommununar fáa minkað um skuldarbyrðuna, soleiðis at henda kemur niður á tríggjar álíkningar. Henda loysnin kostar í alt 67 mió.kr., harav landskassin rindar tær 25. Restin verður at býta millum tær kommunur, sum eiga innistandandi í kommunala kreppulánsgrunninum, og her er Tórshavnar Kommuna nógv tann størsti innskjótarin.

Av hesum 67 mió.kr. skulu tær 50 ætlandi nýtast til at gjalda skuld hjá ringast støddu kommununum, meðan tær seinastu 17 mió.kr. skulu endurrindast teimum kommunum, sum høvdu kurstap í samband við kommunuskuldarumleggingina í 1995.

**Ikki neyðugt við umlegging**

Leivur Hansen legði tó afturat, at orsøkin til hansara støðu í málinum ikki er tann, at Tórshavnar Kommuna ikki vil hjálpa ringast støddu kommununum. Hinvegin er hetta grundað á, at tað eftir hansara tykki er ivasamt, um tað veruliga er neyðugt við eini nýggjari umfígging av kommunuskuldini.

Tá verandi avtala um føroysku kommunuskuldina gongur úr, hin 30. november 2000, fellur avtalan um rentuásetingina samstundis úr gildi.

Marknaðarrentan hevur tó verið sera lág, síðani avtalan varð undirskrivað, og í fleiri førum hava kommunur víst ónøgd, tí rentan smb. kommmunuskuldaravtaluni hevur verið hægri enn marknaðarrentan, hóast hon hevur verið lægri enn ásett í upprunaligu lánsskjølunum.

Leivur Hansen leggur tó dent á, at allir lánveitarar tó hava givið til kennar, at teir ikki hava ætlanir um at nýta gamla rentusatsin, og at tað tískil ikki skuldi verið neyðugt við eini umlegging.

Harumframt hava føroysku peningastovnarnir eisini boðað frá, at eftir teirra tykki hava allar kommunur møguleika at umleggja lánini her á landi, treytað av at núverandi gjaldsskipan, har peningastovnarnir hava transport í skattainntøkunum, kann halda fram.

Tískil heldur Leivur Hansen, at tað kann tykjast løgi, at føroysku kommunurnar skulu leita sær uttanlands eftir møguligum kapitali til eina umfígging, tá vit samstundis eru í teirri støðu, at føroysku peningastovnarnir eru á tremur við peningi

**Púra greitt**

Jógvan við Keldu, býráðsformaður í Klaksvík sigur, at Klaksvíkar Býráð hevur eina greiða fatan av støðuni.

Býráðið hevur viðgjørt málið, og greið semja var um, at Klaksvíkar Kommuna í samstarvi við lánveitarar sínar ætlar at loysa skuldarspurningin, uttan at nakað millumlið verður nýtt á vegnum.

Greiða støða býráðsins er grundað á, at teir hava verið á vitjan hjá útlendsku lánveitarunum, umframt at teir umvegis kommunusamskipanina hava verið í samband við føroysku lánveitarar sínar. Hjá øllum hesum er semja um, at eingin orsøk var hjá kommununi at nýta enn ein lánistovn, sum við tíðini kanska ferð at gerast ein kleppur heldur enn ein hjálp.

Harumframt hevur kommunusamskipanin í seinastuni givið til kennar, at føroysku komunurnar í dag eru »eitt gott pappír«, og at tær tískil hava allar møguleikar at avgreiða síni fíggjarviðurskifti sjálvar.

Sjálvur er Jógvan við Keldu eisini av teirri fatan, at tað ikki er nøkur orsøk til, at enn ein stovnur trínur inn á føroyska pallin, tí eftir hansara tykki hava vit nóg mikið av stovnum her á landi.



*Leivur Hansen metir, at føroysku kommunurnar nú megna at klára seg sjálvar*

**Eingin solidarisk loysn**

Sostatt er lítið sum røkist fyri, at ætlanini hjá Landsbankanum og Unibank um eina solidariska skuldarumlegging verður langt lív lagað.

Sum áður nevnt, er ein av fortreytunum fyri loysnini, at stóru kommunurnar eru við í hesum, men stendur tað til eitt samt Klaksvíkar Býráð og býráðsformannin í Havnini, verður hetta av ongum.



*Í Klaksvík er støðan púra greið, sigur Jógvan við Keldur, býráðsformaður*

ELVIS tónleikakvøld á Restaurant Hafnia
Kjell Elvis hugnar frá kl. 18.00 við sangi og tónleiki
fríggjakvøldið 18. febr. & leygarkvøldið 19. febr.



Menu de Luxe
Hafnia aperitif
***
Citrónlakaður laksur á salati, borðreiddur v/ parmesanosti
***
Heilstokt kálvarygglundir "Duxelles" v/ nýggjum grønmeti og sós Choron
***
Créme Brulée (bakað vaniljukrem)
Høvuðsrættur 175,-
2 rættir 225,-
3 rættir 275,-

Trýssara matskrá
Hafnia aperitif
***
Rækjubland v/ Mary Rose dressingi
***
"Gammeldags" oksasteik v/ glaseraðum leyki, hvítum eplum grønmeti, soðsós, súrum og søtum
***
Pera "Belle Helena"
Høvuðsrættur 125,-
2 rættir 175,-
3 rættir 225,-

Borðbilegging á tel 31 32 33

Hotellið í miðbýnum
Tel 31 32 33
HOTEL HAFNIA